# Magnus er sterkur í Runavík

## Bara tveir býráðslimir vunnu endurval í Runavíkar kommunu, har bara ein kvinna verður við til at stýra triðju størstu kommununi í landinum

**Eirikur Lindenskov**

Tað er rættuliga nógv, sum bendir á, at býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu seinastu fýra árini eisini verður formaður næstu fýra árini.

Magnus Rasmussen í Lamba er fyrst valdur á borgaralistanum í Runavík, sum varðveitti sína støðu við at vinna átta at ellivu sessum. Persónliga valið hjá Magnusi var sera gott. Fyri fýra árum síðani, tá ið hann fyrstu ferð var á listanum, vann Magnus 219 persónligar atkvøður. Hesa ferð settu 348 krossin fyri borgarstjóranum.

Hinir báðir, sum vunnu stóra undirtøku, eru Tórbjørn Jacobsen á Glyvrum og Helgi L. Petersen, sum er ættaður úr Rituvík, og sum rituvíkingar høvdu atkvøtt á listan.

Eftir at valúrslitið var greitt, segði Magnus Rasmussen við Kringvarpið, at hann bjóðar seg fram til borgarstjóra.

- Valúrslitið taki eg sum herðaklapp fyri arbeiðið hjá fráfarandi býráðnum, og eg bjóði meg fram at taka eitt skeið aftrat, segði Magnus Rasmussen.

Merkisvert er tað, at bara ein av ellivu limum í býráðnum í Runavík er kvinna. Í býráðnum, sum nú leggur frá sær, vóru tríggjar kvinnur. Næstformaðurin Sæunn Ó. Hansen varð ikki vald aftur, og Beinta Olsen og Fríðbjørn Weihe vóru ikki á listanum. Einasta kvinnan í býráðnum er nývalda Jónleyg Hammer.

Hesa ferð høvdu oyndfirðingar stillað Hall Ellingsgaard upp á almenna listanum í Runavík. Hann varð valdur, og harvið hevur býráðið nú umboðan úr Oyndarfirði, av Skála, úr Søldarfirði, úr Rituvík umframt úr meginøkinum Glyvrar, Saltangará og Runavík.



## *Ávaringarskipanin virkaði*

Tað var onki galið við ávaringarskipanin, tá ið ein kranabilur fríggjadagin í síðstu viku var fyri óhappi í Leynatunlinum, har bilførarin fekk skaða. Tað sigur Landsverk. Ávaringarskipanin er sjálvvirkandi og virkar soleiðis, at hon leggur bumm fyri vegin, um eitt akfar er ov høgt ella er fermt ov høgt.

- Skipanin er ikki gjørd til at ávara um ein lutur á einum akfari stingur ov høgt upp í loft, sigur Landsverk.

- Skuldi skipanin gjørt hetta, hevði hon verið alt ov fintfølandi og hevði tískil í tíð og ótíð sett bummin fyri vegin, eitt nú í grovum kavaælingi, ella tá eitt nú fuglur flýgur inn í signalið til bumminum, sigur Landsverk.

Í sambandið við óhappið í Leynatunlinum fríggjakvøldið, hendi tað, at kranin á lastbilinum var ikki lagdur saman og tískil var hann alt ov høgt uppi. Sostatt tók hann portalin við tunnilsmunnan við teirri avleiðing, at bilførarin misti tamarhaldið á bilinum og rendi inn í tunnilsveggin. Landsverk sigur, at ávaringarskipanin í Leynatunlinum er sera viðkom og er ein liður í eini royndarverkætlan. Henda verkætlan hevur til endamáls at verja útgerðina, sum hongur í tunnilsloftinum, og at tryggja at bilar, sum koyra aftanfyri ein høgan bil, ikki koma illa fyri, um tað skuldi hent, at útgerð verður rivin undan loftinum og detta niður á vegin.


- Tað er fleiri ferðir hent, at ov høgt fermd akfør hava skrætt útgerð undan tunnilsloftum, sigur Landsverk.

## Í MORGIN





Strúkur í vindi upp í hvassan vind av útsynningi og regn, seinni ælingur og onkur sólglotti. Hitin millum 3 og 6 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Strúkur í vindi upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

## LEYGARDAGIN





Gul til stivt andøvsgul av útsynningi og suðri og ælingur, partvís kavi og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin upp í hvassan vind av útnyrðingi og kavaælingur, Mánadagin hvassur vindur av landsyningi og lýggjari við regni.




**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## LUFTTRÝSTIÐ





**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. við Hvarvið fer móti Íslandi og dýpist.





**Komandi nátt:**
Djúpa lágtrýstið við Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani kemur hendavegin.

## HITALAG




Normal 1961-1990: 7,4°C

## AVFALL




Miðal 1961-1990: 155 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

13. november Tendring
14. november Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2012

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. nov. | 06:12 | 18:44 | 05:12 | 17:44 | 05:27 | 17:59 | 08:12 | 20:44 | 09:12 | 21:44 | 04:27 | 16:59 | 03:27 | 15:59 | 06:27 | 18:59 | 07:27 | 19:59 | 05:57 | 18:29 | 07:12 | 19:44 |
| 15. nov. | 07:14 | 19:45 | 06:14 | 18:45 | 06:29 | 19:00 | 09:14 | 21:45 | 10:14 | 22:45 | 05:29 | 18:00 | 04:29 | 17:00 | 07:29 | 20:00 | 08:29 | 21:00 | 06:59 | 19:30 | 08:14 | 20:45 |
| 16. nov. | 08:15 | 20:46 | 07:15 | 19:46 | 07:30 | 20:01 | 10:15 | 22:46 | 11:15 | 23:46 | 06:30 | 19:01 | 05:30 | 18:01 | 08:30 | 21:01 | 09:30 | 22:01 | 08:00 | 20:31 | 09:15 | 21:46 |
| 17. nov. | 09:15 | 21:44 | 08:15 | 20:44 | 08:30 | 20:59 | 11:15 | 23:44 | - | 12:15 | 07:30 | 19:59 | 06:30 | 18:59 | 09:30 | 21:59 | 10:30 | 22:59 | 09:00 | 21:29 | 10:15 | 22:44 |
| 18. nov. | 10:11 | 22:38 | 09:11 | 21:38 | 09:26 | 21:53 | - | 12:11 | 00:44 | 13:11 | 08:26 | 20:53 | 07:26 | 19:53 | 10:26 | 22:53 | 11:26 | 23:53 | 09:56 | 22:23 | 11:11 | 23:38 |